


www.oljan.fo

**Jan Müller** 20 - 10 - 2011

## Dong ikki til sølu

Dong, Dansk Olie og Naturgas, verður ikki skrásett á danska virðisbrævamarknaðinum, so leingi tann nýggja stjórnin hevur valdið í Danmark. Hesin avgjørdi boðskapurin kemur frá Marionnu Jelved, sum er formaður í tingbólkinum hjá Teimum Radikalu og eisini framsøgufólk floksins í fíggjarmálum. Fyri sjey árum síðani gjørdi sami flokkur annara avtalu við ta táverandi stjórnina hjá Anders Fogh Rasmussen um at skráseta tað almenna felagið á virðisbrævamarknaðinum við sølu fyri eyga. Men nú hevur flokkurin eina aðra støðu, skrivar Jyllands-Posturin. Avgerðin at sleppa søluætlanini ger, at ríkiskasin missir eina stóra milliardainntøku. Eingin veit við vissu, hvussu nógv Dong er vert, men við einum marknaðarprísi upp á 60 milliardir krónur hevði skráseting á virðisbrævamarknaðinum lagt einar 15 milliardir krónur í ríkiskassan, skrivar JP.